## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Fleyr til gul av ymsum ættum, um kvøldið av eystri. Yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 13 og 16 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Lot til andøvsgul av eystri og landnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 13 og 16 stig, um náttina niður í 10 stig.




**Veðrið mánadagin:**
Gul til stívt andøvsgul av eystri og møguliga regn eitt skifti, men annars turt og sólglottar. Hitin millum 11 og 14 stig.

**Veðrið týsdagin og mikudagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av eystri og landnyrðingi, stundum upp í hvassan vind. Sólglottar, men kanska okkurt ælið. Hitin millum 10 og 14 stig.

# Pávin setir lívið í váða

**Benedikt 16. pávi ætlar sær til Turkalands í november, men maðurin, sum royndi at myrða undanmann hansara, ávarar pávan ímóti at fara.**



*Benedikt 16. pávi setir lívið í váða, fer hann til Turkalands sum ætlað.*

-Sum ein, ið kennir umstøðurnar, vil eg siga: Tygara lív er í vanda, um tygum koma higar, sigur Mehmet Ali Agca, sum fyri 25 árum síðani royndi at myrða táverandi pávan, Jóhannes Páll. Hann er eisini dømdur fyri at hava myrt ein turkiskan blaðstjóra í sjeytiárunum og sleppur ætlandi ikki úr fongslinum fyrr enn í 2010.

Ígjøgnum sakførara sín sigur Mehmed Ali Agca, at Benedikt pávi eigur at leggja frá sær. Hann vil vera við, at pávin er undir støðugum trýsti frá ávísum fregnartænastum, sum hava óhepnar upplýsingar um virksemi pávans, meðan hann var kardinalur.

Sambært sakføraranum hevur ávaringin hjá Mehmed Ali Agca einki samband við, at pávin herfyri tengi islam saman við harðskapi og øllum illum. Men aðrir turkar hava ikki gloymt orðini hjá pávanum, hóast hann seinni hevur roynt at biðja um umbering fyri tað, sum hann segði.

-Pávin hevur ein hugsunarhátt, sum hoyrir miðøldini til, og hann hevur ikki skilt, at viðurskiftini eru broytt síðani, sigur næstformaðurin í turkiska stjórnarflokkinum, Salih Kapusuz, við tíðindastovuna Anatolia.

-Søgan fer ongantíð at gloyma hansara óhepnu og skammiligu orð. Søgan fer at minnast hann eins og Hitler og Mussolini, sigur Kapusuz.

Turkiski andstøðuflokkurin, tann republikanski CHP, hevur eisini kravt, at pávin skal taka orð síni aftur.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -- |
| Nuuk | 6 |
| Qaqortoq | 13 |
| Ammassalik | 8 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 13 |
| Seyðisfjørður | 8 |
| Tórshavn | 12 |
| Lerwick | 12 |
| Aberdeen | 16 |
| London | 19 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 16 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 18 |
| Keypmannah. | 18 |
| Helsinki | 16 |
| Moskva | 18 |
| Berlin | 18 |
| Warzawa | 21 |
| Kiev | 15 |
| Bukarest | 23 |
| Paris | 20 |
| Madrid | 28 |
| Róm | 23 |
| Malorca | 26 |
| Athen | 27 |
| Malta | 26 |
| Tunis | 28 |
| Beijing | 27 |
| New Dehli | 35 |
| Bangkok | 29 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 29 |
| New York | 24 |
| Miami | 29 |
| Los Angeles | 22 |
| Meksikobýur | 18 |
| Panama | 30 |
| La Paz | 17 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 23 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt djúpt lágtrýst, 974 hPa. við Írland fer vestureftir og grynnist. Brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum leygarnáttina.




**Í dag:**
Lágtrýstið við Vestur-Noreg fer í landnyrðing. Hátrýstið yvir Grønlandsfjørðinum mennist. Ódnin "HELENE" er 600 fj. Í landsynning úr Capa Race og fer í ein landnyrðing eystan.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 19/9 kl. $06^{00}$– 20/9. $06^{00}$. Hitin í gjár: 11,0°
Minsti hiti máldur í september: - 0,5° - Mesti hiti máldur í september: 19,5°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 19/9 kl. $06^{00}$– 20/9 kl. $06^{00}$
Avfallið higartil í september: 0,0 mm

Brúðarlín
v/ Anniku Gaard
Fagralíð 22
Tlf./Fax. 314281
Brúðar- og brúðargentukjólar við tilhoyri til leigu
Nýggir kjólar kunnu útvegast
www.brudarlin.com

Sosialurin

## VESTFALLSKYRRINDI

22. september Tendring / Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2006

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 22. Sept | 07.24 | 19.44 | 06.24 | 18.44 | 06.39 | 18.59 | 09.24 | 21.44 | 10.24 | 22.44 | 05.39 | 17.59 | 04.39 | 16.59 | 07.39 | 19.59 | 08.39 | 20.59 | 07.09 | 19.29 | 08.24 | 20.44 |
| 23. Sept | 08.01 | 20.19 | 07.01 | 19.19 | 07.16 | 19.34 | 10.01 | 22.19 | 11.01 | 23.19 | 06.16 | 18.34 | 05.16 | 17.34 | 08.16 | 20.34 | 09.16 | 21.34 | 07.46 | 20.04 | 09.01 | 21.19 |
| 24. Sept | 08.37 | 20.55 | 07.37 | 19.55 | 07.52 | 20.10 | 10.37 | 22.55 | 11.37 | 23.55 | 06.52 | 19.10 | 05.52 | 18.10 | 08.52 | 21.10 | 09.52 | 22.10 | 08.22 | 20.40 | 09.37 | 21.55 |
| 25. Sept | 09.13 | 21.31 | 08.13 | 20.31 | 08.28 | 20.46 | 11.13 | 23.31 | - | 12.13 | 07.28 | 19.46 | 06.28 | 18.46 | 09.28 | 21.46 | 10.28 | 22.46 | 08.58 | 21.16 | 10.13 | 22.31 |
| 26. Sept | 09.50 | 22.10 | 08.50 | 21.10 | 09.05 | 21.25 | 11.50 | - | 00.31 | 12.50 | 08.05 | 20.25 | 07.05 | 19.25 | 10.05 | 22.25 | 11.05 | 23.25 | 09.35 | 21.55 | 10.50 | 23.10 |